Fosturforeldrafelagið

Tórshavn 26. januar 2027

Hoyringsskriv ísv. hækkan av vistarhaldi

Bæði samsýningin og upphæddin fyri vistarhald til fosturforeldur hava, orsakað av manglandi javning, staðið í stað frá 2014 - 2021.

Vit fegnast um, at upphæddin fyri vistarhald nú verður hækkað og vilja samstundir vísa á, at átrokandi neyðugt er eisini at gera nakað við samsýningina, tí fosturforeldur eru ógvusliga afturúrsigld í mun til aðrar lønarbólkar.

Í eftirmetingini av fosturforeldraskipanini hjá Barna- og útbúgvingarráðnum, sum er ávegis, er ógvuliga umráðandi - at samsýninigin og hvussu hon verður ásett - verður ein týðandi partur av arbeiðinum.

Tað er okkara vón, at eins og upphæddin fyri vistarhald verður hækkað í ár, at eisini samsýningin verður hækkað, so hon gerst tíðarhóskandi, og at gjørt verður upp við tey árini hon stóð í stað.

Hetta uppskotið ger, at vit fáa tað sum vit hava verið afturúrsigld við í mun til vistarhald, men enn eru vit bert komin hálva leið.

Vegna nevndina í Fosturforeldrafelagnum,

Annlis Bjarkhamar